## DAGSINS MEINING

# Ósømilig kor

Ein kanning av støðuni hjá einsamøllum uppihaldarum og teirra børnum í Havn hevur avdúkað, at hesi liva undir sera vánaligum korum. Talan er um einsamallar møður við einum ella fleiri børnum. Støðan er so vánalig, at nakrar av familjunum eru á markinum til at líða beinleiðis neyð. Verður samanborið við líknandi bólkar eitt nú í Danmark, so er myndin tann, at hesir bólkar í Danmark hava nógv betur umstøður.

Tað kann ikki góðtakast, at ein lítil sera veikur samfelagsbólkur so at siga verður sleptur upp á fjall. Tað eru sum vera man børnini, sum líða mest undir hesum ósømiligu korum. At børn skulu mangla tað mest neyðturviliga so sum mjólk og klæðir í Føroyum ár 2004 fer ikki at bera til. Her má vend koma í. Undan valinum setti Javnaðarflokkurin fokus á korini hjá børnum og barnafamiljum. Flokkurin lovaði at bøta um livikorini hjá hesum bólkum. Flokkurin lovaði m.a. bíligari mjólk og skúlamat. Mjólkin er alt ov dýr í Føroyum, og søgurnar um at børn eta góðgæti heldur enn at hava matpakka við í skúla, eru mangar. Hetta er ikki gott og her má vend koma í!

Vit vita væl, at løtan er kanska ikki tann besta at mæla til at økja um almennu útreiðslurnar. Hinvegin kann landsstýrið ikki sita hendur í favn, nú tað er dokumenterað, at einsamallar møður ikki fáa endarnar at røkka saman. Er peningur ikki tøkur, so má okkurt raðfestast øðrvísið. Løgting og landsstýrið áttu at spegla sær í Danmark og øðrum norðanlondum, har einsamallar møður fáa dyggan fíggjarligan og praktiskan stuðul frá tí almenna. Har hugsar ein fyrst og fremst um børnini, um at tey ikki mugu gerast offur og fáa skaða fyri lívið av einum ótryggum barndómi. Her verða einsamallar møður og børn teirra mestsum revsað. Hetta ber ikki til! Her má vend koma í! So er tað sagt.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tjóðveldisflokkurin hevur víst á loysnir í útlendingamálum

**Høgni Hoydal**



ÍSF hevur heitt á allar flokkar á Løgtingi um at gera støðu sína greiða til útlendingapolitikkin hjá samgonguni.

Ikki skuldi verið neyðugt at sagt, at Tjóðveldisflokkurin hevur barst ímóti útlendingapolitikkinum hjá núsitandi samgongu í orðum og í verki, síðani hetta landsstýrið tók við.

Vit hava sett bæði munnligar og skrivligar fyrispurningar – longu í februar og mars í ár.

Og vit hava heitt á bæði løgmann og landsstýrismálanevndina um at kanna landsstýrismannin, sum eftir okkara fatan hevur givið tinginum og almenninginum skeivar og villleiðandi upplýsingar um útlendingamál.

### Rættartrygd er ongin

Eftir okkara tykki hevur landsstýrismaðurin vavt bæði lóggávu, avtalur og umstingarligar avgerðir saman í ein slíkan ellibita, at serstakliga stórur ivi valdar um rættartrygdina á økinum. Í seks mánaðir hava øll, sum verða rakt av hesum, livað í óvissu. Og so verða knappliga frá degi til dags mannalagnur broyttar og familjur syndraðar, meðan kaos valdar á øllum økinum.

Síðani sigur løgmaður við Hondbóltssambandið, at tey ítróttarfólk, sum eru í landinum, skulu viðgerast eftir gomlu reglunum. Men merkir tað so, at málsviðgerðin av einstøkum málum verður broytt, orsakað av politiskum trýsti? Hvussu er so støðan hjá teimum, ið ongan hava at leggja trýst á landsstýrið fyri seg?

### Láturlig avtala

Og tann sonevnda avtalan, sum nú er kunngjørd fyri ítróttarfólk, er beinleiðis láturlig. Skal nú eitt føroyskt ráð, sum virkar á einum donskum málsøki, hava eftirlit við privatu fíggjarligu viðurskiftunum hjá einum ítróttarfólki – í prosentum?

Og hvat er endamálið og grundgevingin? Er tað ikki føroyska samfelagið og tey einstøku lokalu økini, ið koma at bera kostnaðin kortini?

Er tað ikki nógv betur fyri trivna, integrasjón og samfelagsbúskap, at ítróttarfólk hava eitt lønandi starv afturat ítróttini?

Samanumtikið kann sláast fast, at hetta landsstýrið, uttan nakra haldgóða grundgeving, hevur skapt fullkomnan ruðuleika á økinum. Og hevði nøkur ábyrgdarkensla og nakað veruligt eftirlit verið hjá løgmanni og samgongutingfólki, so hevði hetta málið langt síðani fingið avleiðingar fyri landsstýrismannin.

### Loysnin liggur klár

Tað mest harmiliga er, at alt hetta syndarliga málið, var so óneyðugt sum nakað. Tjóðveldisflokkurin hevur givið øllum tingfólki eitt avrit av teirri avtalu, sum yvirritaði gjørdi við danska ráðharran í útlendingamálum í november í fjør. Henda avtala skuldi undirskrivast sama dag sum landsstýrisfólkini hjá Tjóðveldisflokkinum vórðu send til hús.

Eftirsum at ongin fjølmiðil hevur viðgjørt hesa avtalu til fulnar, loyvi eg mær her orðarætt at endurgeva ta stuttu útgávuna av avtaluni, soleiðis sum hon varð send okkum frá danska ráðharranum. Ein og hvør kann við hesum vissa seg um, at ruðuleikan á økinum hevur nýggja landsstýrið bara sær sjálvum fyri at takka.

Adgangen til at søge om og opnå opholds- og arbejdstilladelse med henblik på beskæftigelse i Færøerne

Det er på et møde mellem Integrationsministeriet og Færøernes Landsstyre den 26. november 2003 aftalt, at der gælder en særlig ordning for meddelelse af arbejdstilladelse til halvprofessionelle idrætsudøvere og –trænere:

- Ansøgning om arbejdstilladelse kan indgives under lovligt ophold i Færøerne, men arbejdstilladelsen skal være opnået, inden arbejdet påbegyndes.
- Der kan gives arbejdstilladelse til maksimalt to deltidsarbejder ved siden af arbejdet i idrætsklubben.
- Den samlede indkomst skal mindst udgøre minimumsindkomsten i Færøerne.

De halvprofessionelle idrætsudøvere og -trænere, der i dag arbejder uden arbejdstilladelse, kan frem til den XX søge om lovliggørelse af deres arbejde.

Efter den XX risikerer halvprofessionelle idrætsudøvere og -trænere at blive udvist med indrejseforbud og straffet for ulovligt arbejde, hvis arbejdet påbegyndes inden arbejdstilladelse er opnået. Arbejdsgiveren risikerer ligeledes at blive straffet for at have beskæftiget en udlænding uden arbejdstilladelse.

For alle andre, der ønsker at søge om arbejdstilladelse i Færøerne, gælder fortsat, at ansøgninger om arbejdstilladelse normalt skal indgives fra hjemlandet. Heri ligger blandt andet, at asylansøgere, der afvises i Danmark, ikke fra Danmark kan søge om arbejdstilladelse i Færøerne.

Der gives kun tilladelse til arbejde på almindelige løn- og ansættelsesvilkår.

Udlændinge, der arbejder ulovligt i Færøerne, risikerer at blive udvist med indrejseforbud og sammen med arbejdsgiveren at blive straffet for ulovligt arbejde.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Heilsan úr Íslandi

**Christopher John Morden**



Eg eri kanadiumaður, búsitandi í Íslandi, og eg var í Føroyum í summar, har eg var á skeiði í føroyskum á Fróðskaparsetrinum. Eg hevði hoyrt um nýggja felagið hjá samkyndum í Føroyum, og eg hevði so eisini áhuga í at taka lut í teirra tiltaki í Grasagarði á ólavsøku og at lurta eftir, hvat Jóannes Eidesgaard fór at siga í røðu sínari.

Eg var í Føroyum til 10. august, og kundi tí fylgja stóra orðaskiftinum í fjølmiðlunum um játtanina hja løgmanni at taka lut í hesum tiltakinum við røðu sínari. Sjálvur helt eg røðuna vera sera góða, og tað at hann var við á tiltakinum var eitt positivt tekin um broyttar tíðir og tað at góðtaka minnilutabólkar í samfelagnum. Tað minti meg um vitjanina hjá Vígdis Finnbogadóttir í hølunum hjá íslendska felagnum fyri samkynd, Samtøkan 78, tá hon var forseti í Íslandi. Eg mintist eisini, hvussu tóran týdning tað hevði, og hvussu positivt tað var, tá borgarstjórin í Toronto, Canada, kom til og talaði á árligu jólagudstæntastuni (við túsundtals áhoyrarum, hjá Metropolitan Community Chrurch (altjóða kirkjan hjá gjeikarum og lesbiskum) og tá hann møtti upp til ta árligu Gay Pride Parade.

Vit sum eru gjeikarar og lesbisk hava verið til í øllum samfeløgum í allari tíð, men hava ofta av trygdarávum verið »í skápinum«. Nakað sum hevur kostað stórar sálarligar skaðar. Tað at »spretta« hevur ikki verið ein møguleiki fyrr enn í nýggjari tíð. Tað var gott at síggja, at gjeikarar og lesbisk í Føroyum kunnu kenna seg væl við hægsta myndugleika tykkara.

Eg vil eisini gera eina viðmerking til Jens av Rana og hansara nýtslu av orðinum »kynvillingur«. Tað kann væl vera, at orðið finst í bíbliuni og í orðabókum, men tað er bara ikki fólkaligt. Sjálvur vil hann helst verið nevndur sum »ein kristin« manna millum, men ivaleyst eru summi, sum nevna hann fyri ein »blindan religiøsan fanatikara« í sínamillum tosi. Fyrsta reglan fyri almennum orðaskifti um eitt og hvørt mál má vera vanlig fólkaligheit.

# Herðaklapp til Óla Jacobsen

Takk fyri, at tú rættaði upp á TV2., sum segði, at teir føroysku fiskimenninir fingu hægri skattafrádrátt orsakað av blokkstuðlinum úr Danmark og fortjentu tað dupulta av tí, sum teir donsku fiskimenninir.

Tað loysti seg at vera treiskur. Tí varð tað ikki tikið aftur, veit ongin, hvørjum tað kundi endað við.

Tú ert ein ordiligur knassi og av góðum tlfari.

Tú ert maðurin, alt Føroya fólk átti at givið eitt herðaklapp. Tú torir at siga tað, sum sigast skal.

Tí hvat skuldu vit gjørt, tá ongin tímir at vera sjómaður meira í Føroyum? Tað er hart nokk í forvegin.

Tað var tú, sum skuldi umboðað Føroyar á Fókatingi.

Sjómaðurin eigur ein góðan og rættvísan formann, sum vit eru stolt av.

**Vilhelm Hansen**
**Leif Petersen**

# Útlendingalógin er ikki trupulleikin

**Kaj Leo Johannesen**



Útlendingamál hava verið eitt heitt evni hesa seinastu tíðina, og serliga eru tað útlendsk ítróttarfólk, sum hava staðið ovast á breddanum. ÍSF hevur í hesum sambandi spurt politisku flokkarnar, hvørja støðu teir hava til málið.

Í veruleikanum er einki nýtt í málinum, tí bæði lóg og mannagongdir, sum verða nýttar, hava verið galdandi í nógv ár. Lógin hevur ongantíð verið nakar trupulleiki, og átti tí heldur ikki at verið tað nú, og mannagongdirnar hava somuleiðis ígjøgnum langar tíðir riggað væl. Løgtingið er ikki nakar trupulleiki, tí har bendir alt á, at ein greiður meiriluti ynskir, at viðgerðin av útlendingaspurningum skal vera so smidlig sum til ber, og fyrrverandi landsstýrismenn á økinum hava ikki havt trupulleikar hesum viðvíkjandi. Í Útlendingastýrinum sær heldur ikki út til, at mannagongdirnar eru broyttar, so tað einasta, sum er nýtt í málinum, er at ein nýggjur landsstýrismaður hevur fingið málið at umsita.

Sjálvandi skulu vit hava lógir viðvíkjandi útlendingum, sum koma til Føroya í stytri ella longri tíðarskeið. Men umráðandi er, at vit ikki viðgera fremmandafólk soleiðis, at tað verður til skaða fyri okkara umdømi úti í heimi. Vit eiga ikki at gloyma, at føroyingar mangan hava kunnað leitað sær til onnur lond at arbeitt, tá arbeiðsloysi hevur verið í Føroyum.

Tá tað nú frættist, at útlendskar familjur, sum hava búð í Føroyum í fleiri ár, verða splittaðar, við at onkur av teimum verður sendur av landinum, meðan onnur fáa loyvi at verða verandi, má sigast, at málið er farið ov langt.

Onkur hevur mælt til, at útlendingamál verða yvirtikin sum føroysk sermál, fyri at skil aftur kann fáast á hesum viðurskiftunum, men tað loysir ongan trupulleika. Sum longu er víst á, so er tað ikki lógin, sum er trupulleikin, men einans ein partur av umsitingini. Líkamikið hvussu vit orða eina lóg, so fæst hon ikki at virka, um partarnir í málinum ikki fáast at samstarva.

Hetta er enn eitt dømi um, at samstarv er vegurin fram.

# Tendrar tú ljós fyri øðrum?

**Gerda Petersen, Esbjerg**

Í sanginum »For at tænde lys« syngur Lars Lilholt millum annað, hetta: Eg haldi at vit eru her fyri at tendra ljós fyri hvør øðrum.

Vit eru øll við til at seta dám á verðina vit liva í. Um vit hava nógv ella lítið at siga í altjóða samanhangi. Um vit eru stjórar ella næmingar á arbeiðsplássinum, so hava vit ávirkan á gerandisdagin hjá teimum menniskjum sum eru rundanum okkum. »Tú hevur lagnu næsta tíns í hondum tínum«, soleiðis ljóðar eitt sitat – eitt sitat, sum beinrakið fortelur at ein og hvør okkara ger mun. Tað er aðalmunur á um vit skapa tryggleika ella ampa har vit eru. Eru vit ljóskveikjarar ella ljósasløkkjarar.

Jesus segði: »Tit eru ljós heimsins, staður ið stendur á fjalli, fjalist ikki. Tey tendra heldur ikki ljós og seta tað undir skeppumálið – nei, í ljósastakan, so tað lýsir í øllum húsinum. Latið soleiðis ljós tykkara lýsa menniskjum, so tey kunna síggja góðu verk tykkara, og æra faðir tykkara sum er í himli«.

*Matteus, kap. 5, vers 14-16*

Vit hava øll fingið ta uppgávu at birta ljós fyri øðrum. Jesus hevur verið á jørðini at tendra ljósið. Hann hevur givið okkum tann setning, at bera ljósið longur fram á vegin. Tað ljós, vit kunna vera við til at bera framá, er ikki bara boðskapurin um kristnu trúnna – men eisini ta kristnu manna-áskoðan. Ein áskoðan sum sigur: Tú ert nóg góður sum tú ert – ein áskoðan sum sigur at vit øll eru líka, og at øll hava týdning.

Undan olympisku leikunum verður fest í tann olympiska kyndilin, sum síðani verður borin frá landi til lands við at fleiri fólk renna við honum fram móti málinum: OL-býnum. Her verður so tann olympiski eldurin kyndur, meðan upplatingarseremoniin fer fram á sjálvum stadion.

Eins og rennarin rennur við tí olympiska eldinum – soleiðis renna eisini vit sum kristin við boðskapinum um Jesus. Í okkara renning er ikki bara pláss fyri útvaldum rennarum – her kunna øll renna við.

Vit renna við ljósi hins æviga lívs – fram móti tí æviga stadion har tann ævigi lívslogin skal kveikjast. Himmalin varir til allar tíðir, login slíknar ongantíð, slóknar ikki sum olympiski eldurin tá leikirnir eru loknir.

Tað er umráðandi at vit hvør í sínum lagi gera okkara til at hjálpa kristna eldinum á veg. Hettar kann gerast uppá fleiri mátar, tó mugu vit alla tíðina leggja okkum í geyma, at vit seta okkum í stað móttakarans.

Á ein vegg hevði onkur skrivað: Kristus er svarið! Niðri undir hevði onkur annar lagt afturat: Hvør var spurningurin?

Tendrar tú ljós fyri øðrum?



# Eivør ikki til at steðga

**Ikki óvæntað standa fólk á rað fyri at hálova føroyska sangfuglinum fyri sínar framførslur í Noregi**

EIVØR Í NOREG
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Fantastisk. Framúrskarandi. Bergtakandi. Føroyski sangfuglurin úr Gøtu, Eivør Pálsdóttir, er ikki til at steðga. Á einari framførslu fyri og aðrari eftir verður hon róst upp um skýggini. Framførslurnar í Noregi týsdagin og hósdagin vóru einki undantak.

Føroyingar, ið hava luttikið á oljuráðstevnuni í Stavanger siga, at útlendingarnir stóðu púra paff eftir framførslurnar hjá Eivør. Týsdagin spældi hon fyri Haraldi kongi í Noregi, og kom væl frá framførsluni. Eivør spældi tvey løg fyri kongi. Føroyski sangfuglurin legði út við eini føroyskari vøgguvísu, og síðan spældi hon eitt svenskt fólkalag.

### Úti konsert

Hósdagin varð skipað fyri almennari útikonsert í Stavanger. Eivør spældi í ein góðan hálvan tíma fyri eini stúgvandi fullari fjøld.

– Har vóru bæði fólk úr Amerika og Australia, og tey vóru skjót at skriva navnið, Eivør Pálsdóttir niður, tí tey gjørdist púra burtur í henni. Frálíka framførslan hjá henni gjørdi okkum stolt av at vera føroyingar, sigur ein føroyskur áhoyrari á útikonsertini hóskvøldið.